# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Svend Ludvig Ryggstein**, vanliga nevndur Luddi, ættaður úr Skopun, búsitandi í Hirshals andaðist 26. januar, 79 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Emmersbæk kirkju fríggjadagin 30. januar klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Ludda kunnu lata eina peningagávu til Heimmissiónsarbeiðið millum útisetar í Danmark. Konta í Norðoya Sparikassa.

†

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at okkara elskaði maður, faðir, verfaðir, abbi, langabbi og bróðir

**Sigmund Haraldsen**
Sandavági

andaðist á Landssjúkrahúsinum mikunáttina, 70 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin kl. 16.00 í Sandavágs kirkju. Jarðarferðin verður úr Sandavágs kirkju leygardagin kl. 14.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Gerda, Marjun, Ann-Mari og Martin**

Tey, ið ynskja at senda blómur ella krans, kunna í staðin lata eina peningagávu á konto í Føroya Banka.

†

**Elinborg Christiansen**
fødd Olsen
av Skála

andaðist í heiminum í Gentofte 25. januar, 74 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Vangede kirkju fríggjadagin 30. januar kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Vivi og Torben**

**Dagurin**
**29. januar. Valerius**. Var síðst í triðju øld biskupur í Trier í Týsklandi.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

# Nýggir sjúkrarøktarfrøðingar



***Aftara rað f.v.:*** *Jacobina Jacobsen, Kristianna Sørensen, Laila Petersen, Lýdia Vesturdal Vesturtún, Malan Lützen, Mariann Johansen, Nicolina Niclasen, Rannvá Jansdóttir Simonsen og Vanja Tórhalla Vestergaard*
***Fremra rað f.v.:*** *Annfríð Haraldsen, Beinta Hansen, Birita Johansen, Dina Gram Lydersen, Jóhanna Sofía (Fía) Tørslev Pedersen og Hjørdis Dagmar Nolsøe*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Mikudagin 28. januar 2009 var prógvhandan á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya, har 15 lesandi fingu prógv sum sjúkrarøktarfrøðingar.

Tað kann til stuttleika nevnast at í tíðarskeiðinum, meðan sjúkrarøktarfrøðingarnir hava lært, hava tær fingið tilsamans 15 børn, og tvey eru á veg. Tó hava ikki allar fingið børn.

Sjúkrasystraskúli Føroya varð settur á stovn 1. februar 1960. Í februar 2000 var skúlin fluttur frá Almannaog Heilsumálaráðnum til Mentamálaráðið. Skúlin hevur síðani virkað sum sjálvstøðugur stovnur undir Mentamálaráðnum.

Í 2003 kom nýggj løgtingslóg um útbúgving av sjúkrarøktarfrøðingum, sum ein útbúgving á bachelorstøði.

**mg**

# Heilsurøktarar fingið prógv



Tann 23. januar 2009 fingu 13 heilsurøktarar prógv á Heilsuskúla Føroya á Tvøroyri.

**Aftast f.v:** Sunrid M. Hansen, Klaksvík, Malan Patursson, Kirkjubøur, Anna B. Thomasen, Trongisvágur, Anna S. Berg, Hvalba, Marin Kristina Øregaard, Tórshavn, Tina Nattestad, Hvalba, og Karin Lovisa Nicodemussen, Argir.

**Fremst f.v.:** Oddvør Olsen, Klaksvík, Ann-Bjørg Jacobsen, Sandavágur, Guðrið Larsen, Vágur, Kristjana Ryggstein, Tórshavn, Lusy Christiansen, Klaksvík, og Eyðbritt Krosslá, Vágur